sólorka
TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI





Um talan er um eitt skíð-tíðarskeið

# Leingist tær eftir at standa á skíðum?







Sierra Nevada merkir »fjallarøðin, har tað kavar«. Navnið kann kennast løgið, tá Andalusia hevur hægsta heilárshitan í øllum Europa, og fjallarøðin er við Miðjarahavið beint norðan fyri Costa del Sol.

Forkláringin er sjálvandi, at Sierra Nevada er upp til 3,5 kilometrar oman fyri havið. Her finna vit sunnasta skíðstaðið í Europa, sum er eitt sera vælumtókt ferðamál.

Sjálvt skíðresortið er bert umleið 45 minuttir við bili úr Granada. Tí er lagamanni hjá okkum at skipa fyri skíðdøgum, har vit koyra teg niðan í kavan um morgunin og omanaftur seinni á degnum.

Hetta er eitt sertilboð til tín, sum hevur hug at standa á skíðum, sama um tú ert royndur íðkari, ella um tú roynir fyri fyrstu ferð.

Tað ber eisini til at fáa frálæru frá professio-nellum instruktørum.

Tú kanst undan fráferðini tekna teg til fýra skíðdagar – um talan er um eitt skíð-tíðarskeið.

**Sí prísirnar í serliga prísskjalinum.**



